Uppskot til Løgtingslóg um almenna talgilda postskipan

KT-felagið hevur fingið uppskot um Talgildan postkassa til hoyringar. Yvirskipað tekur KT-felagið undir við uppskotinum, men hevur fleiri viðmerkingar bæði til uppskotið, men eisini til viðmerkingarnar til uppskotið.

Viðmerkingar til lógartekstin

§3, stk. 2 Merkir, at Mínboks kemur at innihalda flest allar fráboðanir við viðkvomum dátum frá almennu stovnum til borgaran. Hettar ber nakrar spurningar við sær sum ikki eru viðgjørdir.

1. Hvørjir váðar eru til staðar fyri at upplýsingar koma til óviðkomandi?
2. Hvørjar eru avleiðingarnar?
3. Hvørjar yvirskipaðar tøkniligar fyriskipanir eiga at verða framdar fyri Mínboks? M.a heldur KT-felagið, at brøvini eiga at verða bronglaði á goymsluni hjá Mínboks soleiðis, at bert borgarin kann lesa brøvini og at t.d. Mínboks umsitarar ikki kunnu lesa innihaldið í brøvunum)

Lógin áleggur løgfrøðiligum persónum at binda í Mínboks um teir hava tørv á talgildum upplýsingum frá almennum stovnum har upplýsingarnar verða mettar at vera trúnaðarupplýsingar. Men tá hentleikin ikki finst í skipanini enn, er tað ov tíðliga at áseta hesi viðurskifti í lóg.

§5. Rættarvirknaður

Til slíkan rættarvirkna eigur skipanin at brúka eitt óavvísiligt tíðarstempul fyri móttøku av brævi. Tíðarstemplið skal vera sjónligt fyri brúkaran av Mínboks og sendari eigur eisini at fáa tíðarstempli aftur frá Mínboks tá eitt bræv er sent. Hetta tykist at virka við innritan frá teldu, men ikki við appini.

§6. Persónstalið

Spurningurin um at útflýggja p-tal til løgfrøðiligar persónar fyri at lætta um teirra arbeiðið við íbinding til Mínboks, eigur at viðgerðast í breiðari høpi enn bert fyri tænastuna Mínboks. T.v.s. kann p-talið latast løgfrøðiligum persónum tí tað lættir um hjá løgfrøðiliga persóninum at fremja sítt virksemi, herundir senda brøv til Mínboks, rita inn við Samleikanum og fáa p-tal upplýst og lætta um samkoyring av egnari kundaskrá við persónsskránna hjá Landsfólkayvirlitið.?

P-talið er eyðmerkingin av einstaklinginum. KT-felagið heldur, at P-talið eigur at leysgevast, soleiðis at eisini privatar fyritøkur kunnu menna skipanir upp ímóti almenna talgilda postkassanum. Tað er eingin orskøk at bert almennir stovnar skulu hava atgongd til hetta.

Viðmerkingarnar:

s4. "...loysnin lýkur krøvini um trygt talgilt samskifti..." – KT-felagið heldur, at metingin eigur at vera viðløgd her. Harumframt hevur tað minst líka stóran týdning, at Mínboks hevur trygga talgilda goymslu (bronglaða goymslu)

S5 "...Mínboks skal veita trygd fyri, at samskiftið ikki verður broytt á vegnum, og at samskiftið er bronglað, so at samskiftið ikki kann lesast av óviðkomandi..." – KT-felagið vil vísa á, at tað somuleiðis hevur minst líka stóran týdning, av brøv ikki kunnu broytast meðan tey eru í goymsluni hjá Mínboks og ikki kunnu lesast av óviðkomandi, meðan tey eru í goymsluni hjá Mínboks.

S5. "...Hetta merkir, at um ein sendari vil vera við, at viðkomandi ikki er sendari... so hevur sendarin prógvbyrðuna av, at viðkomandi ikki er sendarin." – KT-felagið heldur, at neyðugt er at grundgeva fyri hvørjar tøkniligar fyriskipanir eru framdar, so at hetta er eitt rímiligt krav

S6. "Fyrimunir við skipanini" – undarligt at grundgeva við at tað slepst undan at menna integrátión til Samleikan og so ikki nevna at ístaðin skal ein integrátión mennast til Mínboks. Harumframt er Samleikin ein hornasteinur í føroysku taldildingini og tað óskilligt at grundgivið fyri ikki at binda seg í Samleikan. Er áskoðanin at kostnaðir er ov høgir at binda seg í Samleikan, so er at seta gjaldið niður.

S7 "...Tað krevur ikki stórvegis KT kunnleika á stovnunum fyri at knýta seg í Mínboks..." –Her vil KT-felagið vísa á, at tað krevur forritanar kunnleika at sambinda egna skipan við Mínboks.

Fyri at taka samanum vil KT-felagið vísa á, at í heila tikið tykjast fleiri av viðmerkingunum til lógaruppskotið at vera heldur veikt grundgivnar. KT-felagið heldur, at kanningar og metingar til lógaruppskotið eiga at fyriliggja. Eisini vónar KT-felagið at fáa svar uppá teir spurningar og ivamál, sum her eru reist til lógaruppskotið.